# Øssur við nýggjari fløgu

**Øssur Johannesen hevur givið út nýggja fløgu, nevnd " Ein harður vegur ígjøgnum svartasta helviti við kós ímóti deyðnum"**

FLØGUÚTGÁVA

Nýggja fløgan hjá Øssuri Johannesen kallast "Ein harður vegur ígjøgnum svartasta helviti við kós ímóti deyðnum".

Tittulin sipar til tragisku lísroyndirnar hjá einum psykist sjúkum manni, sum í hesum førinum er Øssur sjálvur.

Fløgan var upptikin um somu tíð, sum Øssur var innlagdur á Psykiatrisku Deild. Øssur spælir sjálvur øll ljóðførini, ið eru bassguitar, guitarar, trummur og orgul. Øssur hevur sjálvur komponerað skipað og produserað tónleikin.

Tað er Hjalti Joensen, sum hevur tikið upp og ljóðblandað. Fløgan var tikin upp upp á fimm tímar.

Allur tónleikurin er improviseraður og inniheldur ymiskar stemningar frá stillum syrgiligum guitarspæli til meira blueskent meditativt bassspæl til syrutar orgultónar og meira vilt ekspressivt og virtuost bassspæl.

Øssur hevur áður givið fimm fløgur út, tríggjar solo og tvær saman við Hjalta Joensen.

Plátufelagið Tutl gevur út fløguna.






## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind og regn ella mjørki. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og támut veður ella mjørki, men lítið ella einki avfall. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi sunnudagin regn av og á, men mánadagin ælingur. Hitin millum 6 og 10 stig.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -3 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 7 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 8 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 21 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 26 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 18 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 27 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 18 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 977 hPa. yvir Norska Havinum fer í landnyrðing. Eitt hátrýst, 1023 hPa. í útsynning úr Írlandi fer móti Onglandi og ein hátrýstryggur til Íslands verður yvir Føroyum hósnáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hóskvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/10 kl. 06[00] – 10/10. 06[00]. Hitin í gjár: 5,3°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 09/10 kl. 06[00]– 10/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 25,0 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum**

**Mikudagin 17 oktober kl. 16.00**
*Bragdið 60 ár*

**Mikudagin 17. Oktober kl. 19.30**
*Psykoterapiútbúgving*

**24. oktober**
*Demokratia*

**25. oktober**
*Føroyskt Lógarrit*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Lesið Sosialin -tað loysir seg

## VESTFALLSKYRRINDI

11. oktober Tendring
13. oktober Mánin longst frá jørðini
19. oktober Fyrra kvarter
26. oktober Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17 . okt. | 11.42 | - | 10.42 | 23.05 | 10.57 | 23.20 | 01.19 | 13.42 | 02.19 | 14.42 | 09.57 | 22.20 | 08.57 | 21.20 | 11.57 | - | 00.34 | 12.57 | 11.27 | 23.50 | 00.19 | 12.42 |
| 18 . okt. | 00.05 | 12.28 | 11.28 | 23.52 | 11.43 | - | 02.05 | 14.28 | 03.05 | 15.28 | 10.43 | 23.07 | 09.43 | 22.07 | 00.20 | 12.43 | 01.20 | 13.43 | - | 12.13 | 01.05 | 13.28 |
| 19 . okt. | 00.52 | 13.29 | - | 12.29 | 00.07 | 12.44 | 02.52 | 15.29 | 03.52 | 16.29 | 11.44 | - | 10.44 | 23.21 | 01.07 | 13.44 | 02.07 | 14.44 | 00.37 | 13.14 | 01.52 | 14.29 |
| 20 . okt. | 02.06 | 14.42 | 01.06 | 13.42 | 01.21 | 13.57 | 04.06 | 16.42 | 05.06 | 17.42 | 00.21 | 12.57 | 11.57 | - | 02.21 | 14.57 | 03.21 | 15.57 | 01.51 | 14.27 | 03.06 | 15.42 |
| 21 . okt. | 03.18 | 15.39 | 02.18 | 14.39 | 02.33 | 14.54 | 05.18 | 17.39 | 06.18 | 18.39 | 01.33 | 13.54 | 00.33 | 12.54 | 03.33 | 15.54 | 04.33 | 16.54 | 03.03 | 15.24 | 04.18 | 16.39 |